


# Landafrøðin og menniskjan

Í 2014 gav Nám út bókarøðina Landafrøði 1–3, sum er ætlað 7.–9. flokki. Saman við bókunum er ein lærarabók, ið liggur á snar.fo.

**Tekstur:** Elin Henriksen

Í lærarabókini eru arbeiðsuppgávur til næmingar, ískoytistilfar bæði til næmingar og lærarar, uppskot til undirvísingargongdir og førleikamál og hugskot til ískoytisevni. Harumframt er ein frágreiðing um tey sjónarmið, ið eru grundarlag undir bókaheildini Landafrøði 1–3.

### Fakligir førleikar

Hetta tilfarið er rættiliga nær tongt at nýggju námsætlanini fyri landafrøði. Evnini, sum verða viðgjørd, samsvara væl við krøvini til *Fakligar førleikar*.

Tey snúgva seg í fyrsta lagi um at ogna sær grundvitan og at greiða frá, viðgera og lýsa tey ymsu fyribrigdini. Hesin tátturin av landafrøðini verður í lærarabókini nevndur kvantitativur kunnleiki. Hetta er tann mest ítøkiligi parturin av landafrøðini. Samstundis er ein hópur av nýggjum hugtøkum, sum næmingarnir mugu læra, eins og teir mugu læra arbeiðshættir til lærugreinina.

### Landafrøði 1 – Náttúrulandafrøði

Í Lærarabókini er tað serliga tilfarið til Landafrøði 1, sum miðar eftir at menna júst hesar førleikar hjá næmingunum. Stórur dentur verður lagdur á, hvussu vit læra og fata hugtøk, eitt nú við at gera hugtakastigskipanir. Eisini verður arbeitt við at viðgera sambond millum ymisk fyribrigdi, umframt millum lutir og heild.

Í fyrstu syftu kann tað tykjast, sum tað fakliga innihaldið í Landafrøði 1 er torskildari enn í hinum báðum bókunum, tí her eru so nógv nýggj orð og hugtøk at læra. Men bæði frágreiðingarnar í næmingabókini og arbeiðsuppgávurnar í lærarabókini eru ítøkiligar og seta harvið ikki líka stór krøv til úrtøkiliga hugsan sum Landafrøði 2–3.

### Landafrøði 2 – Mentanarlandafrøði

Í mentanarlandafrøðini verða evnini meiri samansett, tí nú verður í størri mun viðgjørt, hvussu menniskjan ávirkar bæði náttúruna og síni egnu lívskor. Her miða uppgávurnar eftir, at næmingarnir læra at finna og skipa upplýsingar, at síggja orsakir og avleiðingar og at meta um og samanbera ymisk viðurskifti. Tey verða eisini eggjað til sjálv at taka støðu, taka avgerðir og grundgeva fyri sínum sjónarmiðum.

Í Landafrøði 2 verður alsamt meiri arbeitt við kvalitativum kunnleika: at fata, grunda, greina, meta um. Her verður arbeiðshátturin sostatt víðkaður til í størri mun at fevna um úrtøkiliga hugsan. Lærarabókin leggur tó dent á, at hesin mátin at hugsa ikki er nakað, sum næmingar í hesum aldri kunnu væntast at duga frammanundan, men tað er uppgávan hjá skúlanum at geva teimum høvi at læra tað. Við støði í Lærarabókini ber til at arbeiða stigvíst og miðvíst við hesum.

| Innihald í lærugreinini | Førleikar | Heildarmenning |
|---|---|---|
| kvantitativur kunnleiki, kenna fakta | almenn vitan | størri sjálvsálit, minni fremmandgjørd |
| læra hugtøk og at nýta tey, stigskipa hugtøk | læra at greina og skipa vitan | varðveita vitan í minninum, duga at "finna hana aftur" |
| skipa upplýsingar: bólka, tíðarlinjur, tankakort | finna, hvat er viðkomandi; keldukritikkur | meta um, hvat hevur týdning (ikki "drukna" í smálutum) |
| greina orsakir og avleiðingar | síggja sambond og heildir | skilja umheimin, sleppa fordómum, álit á egin evni at hugsa |
| síggja munir og líkleikar | samanbera | hugsa sjálvstøðugt |
| meta um fyrimunir og vansar | gera niðurstøður | duga at taka støðu |
| greiða frá egnum sjónarmiðum | grundgeva | samskifta og samarbeiða, taka ábyrgd |
| orða egnar spurdómar | djypri fatan, minnast betur | menna forvitni og áhuga |
| skipað bólkaarbeiði | tíðarætlan, framløga | menna samstarvsevni |
| kenna lívskor hjá menniskjum í øðrum londum og tíðum | greiða frá úr sjónarhornum hjá øðrum (aðrastaðni og í øðrum tíðum) | virðismeta egin viðurskifti, menna innlivingarevni, búnast kensluliga |
| søguligar orsakir til fyribrigdi | skilja nútíðina | virka í framtíðini |

### Landafrøði 3 – Økislandafrøði

Her verða teir einstøku heimspartarnir viðgjørdir. Leisturin er lutvíst tann sami fyri allar heimspartar, men harumframt verður eitt ávíst fakligt sjónarhorn brúkt fyri hvønn heimspart sær. Harvið ber til at læra fjølbroyttar mátar at arbeiða við landafrøði.

Landafrøði 3 er tann av bókunum, sum setur størst krøv til úrtøkiliga hugsan. Orð og hugtøk verða ikki longur lýst so hvørt; nú verður tað, sum er lært í Landafrøði 1–2, brúkt til at viðgera landafrøðilig viðurskifti kring allan heim.

Tilfarið í Lærarabókini miðar eftir, at næmingarnir lýsa mál úr fleiri sjónarhornum, gera egna niðurstøður og kjakast sínámillum.

### Stigvís menning gjøgnum Landafrøði 1 – 2 – 3

Við at brúka teir læruhættir, sum Lærarabókin mælir til, verður farið frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. Næmingarnir læra fyrst at finna upplýsingar, síðan at svara spurningum og at enda at orða spurningarnar. Fatanin mennist frá *vitan* yvir *metingar og støðutakan* til *førleika at finna loysnir.*

### Støðisførleikar

Mátin, sum evnini eru viðgjørd í næmingabókunum, samsvarar við tey sjónarmið, sum eru nevnd í námsætlanini undir yvirskriftunum *Endamál* og *Støðisførleikar.* Eitt dømi er týdningurin av, at næmingarnir eisini bera tað fram, sum teir hava lært. Hetta leggur Lærarabókin stóran dent á, ikki minst tí at tað er ein tann besti mátin at festa vitanina í minninum. Arbeiðsuppgávurnar fevna um ítøkiligar og fjølbroyttar hættir at bera fram, bæði einsæris og við skipaðum bólkaarbeiði, umframt næmingalagaðar arbeiðshættir.

### Fakligt innihald, førleikar og menning

Ætlanin við Landafrøði 1–3 og Lærarabók er ikki einans at geva næmingunum holla vitan um landafrøði. Læruhátturin miðar eisini eftir gjøgnum tað ítøkiliga arbeiðið at menna ávísar førleikar, sum so aftur økja um innlitið í tað fakliga innihaldið. Og omanfyri hesi bæði sjónarhorn er heildarmenningin av næminginum – at hann mennist til at gerast alt betur førur fyri at taka við avbjóðingum, m.a. teimum, sum koma til sjóndar í fakliga innihaldinum í landafrøðini. Hendan ætlan er eitt týðiligt støði undir bæði næmingabókum og lærarabók og sæst aftur í ítøkiligum evnum, undirvísingargongdum og arbeiðsuppgávum.

Við yvirlitinum omanfyri er gjørd ein roynd at greiða frá sambandinum millum tað fakliga innihaldið, teir førleikar, sum eru tongdir at tí, og teir menniskjaligu eginleikar, sum fáa høvi at mennast gjøgnum viðkomandi arbeiði.

Sí útgávuheimin á:
**snar.fo/landafrodi**